

*Týsk bløð skriva millum annað, at hepnið skal til, bara fyri at endurtaka 2-1 sigurin í Hannover*

Fótbóltur 11 juni. 2003:

# Tey smáu londini eru vandamikil

**- Óttin fyri Føroyum í Týsklandi**

*Kim Simonsen*
*(Baden- Württemberg)*

Her í Suðurtýsklandi er steikjandi heitt, í gjár eini 29 hitastig í skugganum í dag er heitari, men týsku bløðini loypa ikki fram av av hitanum, men eru sera varin og fair mótvegis dystinum í dag. Stóra fótbóltsblaðið Sportmagazin Kicker hevur í dag Føroyar á Forsíðuni. Mynd er av Rudi Völler á forsíðuni, ið sigur at Týskland skal hava øll trý stigini móti Føroyum. Avísin Sonntag Aktuel hevur stórar greinar um fótbólt og eina ferðafrásøgn úr Føroyum, við nógvum myndum í litum. Frankfurter Allgemeine og Das Bild hava øll Føroyar á forsíðuni í hesum døgum.

Tríggir ítrottartíðindamenn skriva í serliga EM-blaðnum hjá Sportmagazin Kicker at týska Landsliðið væntar klassa og at liðið tykist ikki trúgva egnum evnum fyri tíðina. Yvirskriftin er "Die Furcht vor den Färöern", ella óttin fyri Føroyum. Teir skriva at tá týska landsliðið lendu í Vágum klokkan 12 í gjár høvdu teir ikki gloymt at Hjalgrím Eltør rann fríur fram við Oliver Kahn í 83. minutti í Hannover í 2002. At á "Seyðaoyggjun-um" (sum teir í heilum kalla Føroyar) koma hesir spælarnir við ringu royndum úr Skotland, har Týskland spældi 1:1. Hetta lagt saman skapar týska óttan fyri Føroyum. Teir eru bangnir fyri at um Týskland spældi sum í Skotlandi koma teir "unsere blaue Wunder erleben", t.v.s. at teir koma at uppliva teirra óvæntaða fall. At uppliva "eine blaue Wunder" er ein óvæntað hending, ið tó er elvd av t.d. at kenna seg hástóran, sum vit sóu við Eysturríki, ið kom at merkja teirra lívs "blaue Wunder" í 1990 í Malmø í Svørríki. Liðskiparin Oliver Kahn (Bayern München) sigur seg vera bangan fyri hesi hending, um teir spæla sum í Skotlandi leygardagin. Michael Ballach (Bayer München) heldur fyri: "at í dystinum móti Skotlandi spældu vit móti einum sera veikum liði, men vit høvdu ikki sjálvsálit so einki er avgjørt móti Føroyum" .



*Fyrrverandi týski landsliðsvenjarin, Berti Vogts, sigur, at hann eftir 7 septemur 2002 við 2:2 dystinu, lærdi at Føroyingar hava sterkar spælarar og at liðið hevur fleiri skjótar og hegnigar spælarar*

### Undirmeti ongantíð hin lítla

Ein fótbóltur er enn rundur og einki annað er avgjørt siga 3 gamlir landsliðsspælarar á týska landsliðnum, ið allir eru samdir um at neyðugt er at vera eyka varin móti smáum londum. Hannes Löhr spældi í 1967 0:0 móti Albanien, han sigur at eisini vise-heimsmeistarar og heimsmeistarar kunnu tapa móti fótbóltsdvørgum. Hann vónar, at hetta ikki kemur at henda. Ull Stellke spældi í 1982 á týska landsliðinum og var við tá teir taptu 1:2 móti Algeria. Hann sigur at afrikanarnir spældu í eini eufori eftir fyrra málið. Hann heldur at bæði Kahn og Ballack eftir dystin í Skotlandi hava sæð vandan við teim smáu, ið ger at teir ikki tora at siga so nógv um Føroyar. Kirsten Mund spældi í 1997 3:2 móti Albania, meinar tó at Týskland kemur at vinna í Føroyum.

### Føroyingar eru sterkir

Berti Vogts venjarin hjá Skotlandi helt fyri í blaðnum Sportsmagazin Kicker, at hann eftir 7 septemur 2002 við 2:2 dystinu, lærdi at Føroyingar hava sterkar spælarar og at liðið hevur fleiri skjótar og hegnigar spælarar. Ballack heldur fyri í somu grein, at neyðugt er at vit fáa tamarhald á spælinum, vit skulu hava bóltin, gerst tryggari við bóltinum og ikki missa bóltin so oftani sum í Skotlandi".

Spælarin Miroslav Klose fylti 25 ár Annan Hvítusunnudag, hann hevði ikki tíð at halda føðingardag. Áloyparin frá FC Kaiserslautern, sum við sínum 28 landsdystum hevur fingið 14 mál, sigur seg ikki vita nógv um fólk í Norðanlondum, annað enn at tey eta nógvan seyð. Men tað er langt síðani at Klose hevur fingi mál til landsdyst, so hann er kanska ikki so vandamikil.

Bløðini hava stórar myndir av føroysku og av týsku liðuppstillingini. Tey stóru ítrottarbløðini hava langar áhugaverdar tulkingar av dystinum í Skotlandi, ið eisini seta fram taktik um dystin í dag í Føroyum. Serliga at defensiva lokaða spælið má umsetast til skjótt offensivt spæl. Spælarnir eiga at vita hava teir skulu leggja megina, serliga minnast at renna fram við síðunum á vøllinum. Niðurstøðan er at skal týska liðið ikki gera somu feilir sum móti Litavia og móti Skotlandi móti Føroyum, skal hepni til, ella endurtaka teir helt bert 2:1 í Hannover.

### Vit vinna sum einki

Jens Jeremies er eitt undantak frá restini av spælarunum í bløðunum, hann heldur at: "móti Føroyum vinna vit sum einki", stolti Bayern München Landsliðsspælarin ivast ikki um: "um vit brúka øll hundrað prosentini soleiðis koma vit at sleppa undan óvæntaðum úrslitum (blaue Wunder). Føroyingarnir eru ikki veikari enn skotar. Teir eru taktiskir og í góðum formi". Spurdur um hvat skal til fyri at vinna svaraði Jeremies: "Vit skulu halda feððina, halda bóltin, spæla skjótari og vera nógv meiri offensivir". Vinna vit so? Spyr blaðmaðurin: "Vit vinna heilt víst".

Nógv er eisini at hoyra um dystin í Føroyum og um Føroyar á týskum útvarpsstøðum og í stjónvarpinum fyri tíðina. Samanumtikið eru røddirnar sera trilvandi og eingin tori at siga alt ov nógv um dystin áðrenn hann er leiktur.



# Hvørji eru vit í Europa?

**-Ein roynd at skapa ein nýggjan europeiskan samleika og eitt ”kjarnu Europa”. Sjey heimskendir intellektuellir vilja styrkja europeiska samleikan.**

*Kim Simonsen*



*Kim SImonsen hugleiðir*

Týsk bløð skriva í hesum døgum nógv um at eitt nýtt europeiskt almenni møguligani er føtt. Kendi týski heimspekingurin Jürgen Habermas, italienski Umberto Eco, franski Jacques Derrida, Fernando Savater frá Spania, Gianni Vattimo úr Italiu og Richard Rorty úr USA hava tikið seg saman at orða eina tulking av einum nýggjum møguligum og neyðug samleika fyri eitt ”kjarnu Europa”. Teirra boðskapur vakti stóran ans. Teirra tulking er at vit í Europa í dag eru veik og ósamd mótvegis. Hetta serliga í viðurskiftinum til USA. Bløð sum FAZ (Frankfurter Allgemeine Zeitung), Libération, La Repubblica, El Pais og Süddeutscher Zeitung hava skriva nógv um hetta í hesum døgum. Royndin hjá habermas og teimum kendu intellektuellu er ein visión um eina yvir-tjóðar europeiska ”tjóðarbygging”, í eini tíð har serliga Frankaríki og Týskland eru sera ósamd við USA og langt frá hvørjum øðrum.

Jürgen Habermas er ein stórur heimspekinguri og sosiologur, ið upprunaliga kom úr kenda Frankfurtaraskúlanum, ið fram til annan heimsbardaga helt til í Frankfurt an der Oder. Habermas er nógv virdur millum manna og tað klæðir tiltakinum at hann stendur á odda, ið leggur seg tætt at ein grein hann skrivaði í 1996 um nationalstatin í Europa í dag sum er undir broytingum eftir at ES, altjóðagerðingin og broyttar heimsmyndir krevja eitt nýtt slag av virðum, har t.d. hvør tjóð ikki kann halda á at vísa á eina savnandi kensluborna eind, ið vísir til ein tjóðskaparligan samleika, ið nærum altíð er skaptur á einum mytiskum og irationellum lendi, sum í endar við at blaka innflytarar og onnur fólkasløg í einum landi í ein bólk, ið eitur ikki veruligir ”týskarar”, ”danir” ella ”fransmenn”. Bólkurin av intellektuellum vilja skapa eitt sterkt og savnað Europa, eitt ”kjarnueuropa”, har londini hava sama uttanríkis og trygdarpolitik. Die Zeit finst tó at ætlanini, at hon er hin sama sum eftir annan heimsbardaga, at sameina Fraklandi, Týskland, Belgia, Luxsemburg og Italien (í dag uttan Berlusconi). Skribenturin hjá Die Zeit er bangin fyri at eitt slíkt tiltak kann enda sum eitt ”nationalistiskt” rakstrarróp og sum ein slagsangur, eins og ein internationale. Die Zeit er sum ein týsk avís runnin úr einum týskum siði at demonisera alt, ið bert minnir um nationalismu, ið møguligani í hesum føri er ein skeiv meting.

### Hvat er europiskt og hvat er ikki?

Teir intellektuellu í bólkinum royna at tulka hvat er europeiskt í dag. Mangan endar ”tað europeiska” sum tað, ið ikki er amerikanskt. habermas heldur t.d. fyri at europeiskur samleiki byggir á sekularisering (mótvegis amerikanska Bush), at vilja fremja sosialar skipanir, vistfrøði, eitt atfinningarsemi mótvegis tøkni, mótstøða mótvegis at hin sterkari hevur rætt, ikki at vilja geva statinum meiri vald. Habermas heldur at grundfest europeisk virði ikki sum so eru europeisk, men vesturlendsk og tí meiri universel. Amerikumaðurin Richard Rorty er við í bólkinum fyri at styrkja Europa, og á tann hátt at fáa eitt annað og betri Amerika. Emberto Eco úr italia er ikki samdur við Habermas, hann heldur ikki at alt er so einfalt. Amerika er ikki móti hesum virðum, sum eru í orðingini hjá Habermas. Eco meinar ikki at Amerika er ”the other/das Andere”.

### USA og Europa

Italski heimspekingurin Gianni Vattimo, ið eisini er limur í Europaráðnum, viðgongur at ein ávís øði mótvegis Bush liggur aftanfyri hesa álvarsomu royndina at seta fram ein europeiskan samleika. Vattimo meinar at neyðugt er at: ”skapa eina aðra visión um lívið, eitt annað hugtak um tað góða lívið og eina aðra eksistentiella ætlan”.

Handan ætlanina er eisini ein roynd at fyrihalda seg til valdsjavnvágina í dag, til heimskapitalismuna, ið byggir á upplýsing og á gomul klassisk vælferðarhugtøk, í mun til trúðar- og liberalismumentania í USA.

Á ein hátt eri eg samdur við fleiri kritikarum, ið hava ført fram, at Habermas og hinir intellektuellu byggja ein verjugarð rundan um ein longsul eftir fortíðini, tíðina áðrenn 1989, altjóðagerðingina, 11 september 2001 og at gomlu eystanlondini skjótt eru við í EU. Habermas og Derrida vóru frammi longu 15 február við atfinningum motvegis USA. Teir skilja ikki at t.d.ein maður sum Václav Havel stuðlaði USA í Irak, at hetta ikki bert var av populistiskum orsøkum, men av at hesin og onnur eystanfyri hava livað síni bestu ár í diktatoriskum statum, ið tey intellektuellu vestanfyri ikki funnust at. Vilja fólk sum Habermas ikki viðurkenna hitt veruliga stóra Europa og at tíðin eftir 1989 er ein onnur, kemur hetta tiltak at doyggja. Tankin um at sleppa av við eina so stóra amerikanska politiska ávirkan í Europa er í lagi

Týskland í mótvindi

## – Agenda 2010

*Kim Simonsen*

Týskland er í kreppu, ið serliga sæst á vaksandi arbeiðsloysinum. Serliga Berlin er hart raktur skrivar Die Zeit. Royndin at byrgja upp fyri arbeiðsloysinum við 138 millíónum Euro í Berlin er miseydna. Serliga eru tað ”die Ossies”, tey í fyrrverandi DDR, ið eru arbeiðsleys. 13 ár eftir samanleggingina av báðum týsklondunum, er enn stórur munur á lívinum í Vesturtýsklandi og eystaru økjunum.

Tey ríkastu Bundeslondini í tí sameinda Týsklandi eru Bayern við stóra og ríka kraftsentrunum München og grannaøki Baden-Wüttemberg, ið m.a. framleiðir teir flestu týsku bilarnar.

Sjálvt um tey í Eysturtýsklandi í dag arbeiða umleið einar tríggjar tímar meiri enn tey í vestaru grannaøkjunum, so forvinna tey minni. Gerhard Schröter og flokkurin SPD hevur av øllum alvi roynt at broyta hetta, m.a. við sloganinum ”mut der veranderung”, ella mót til at fremja broytingar. Í Týsklandi í hesum døgum er nógv skriva um Agenda 2010, ið er politiska ætlanin hjá SPD. Tað stendur púra greitt at týski búskapurin ikki hevur tað gott, og neyðugt er tí at fremja stórar sparingar. Í Agenda 2010 ætlanini er serligur dentur lagdur á arbeiði og útbúgving, her hugsa tey serliga um tey eystan fyri Elben ánna, har ein millión fólk leita eftir arbeiði. Í fleiri økjum eru 19% arbeiðsleys, ið er meiri enn helvtina fleiri enn í restina av stóra landinum. Fleiri støð er ídnaðurin í gamla eysturtýsklandi skrambladur saman, eingin torir at seta pening í nakað har, so úrslitið gerst at eingi nýgg virki koma.

Við Agenda 2010 er greitt at fíggjarmálaráðharrin Hans Eichel skal spara minst 15 milliardir Euro (helst 18) (hetta er umleið 115 milliardir krónur hvørt ár). Tá Bundestingi og Bundesøkini koma saman eftir summarfrítíðina fara tey at kjakast um Agenda 2010 ætlanina, ið fólk ræðast. Hetta ger ikki javnaðarflokkin SPD serliga vældámdan, tí øll koma at finnast harðligani at honum, sjálvt um flokkurin helst einki annað kann gera í hesi støðu. Hetta fer at hevna seg illani við næsta væl og ”er ein stórur skaði fyri flokkin” sigur ein fremstandandi javnaðarkelda í Die Zeit (ið er hin mest virda avísin í Týsklandi). Týskland er skjótt sjúklingurin í Europa. Í passar illani við myndina av hesum sterka ídnaðarlandi vit eru von við at hoyra um.

Tað hevur stóra ávirkan á Danmark at týski búskapurin er so illani fyri, tí Týskland er hin størsti marknaðurin fyri danskar landbúnaðarvørur.